Tórshavn 14.05.2025

Eg eri eri so glað yvir, at tað finnast menniskju her á landi, sum hava virðing og empati fyri ØLLUM menniskjum, og sum ikki eru stýrd av religiøsari fanatismu. Fólk, sum tora at siga sína meining og tala at, tá á stendur, og sum verja borg, hóast tey verða niðurgjørd av føroyskum racistum og hentum idiotum, sum sníkja seg framvið húsaveggirnar, meðan tey lúra seg at taka nakrar myndir, áðrenn teir fara heim at spilla hesi út á eitt nú Facebook. Og hesi gera stórt sæð ikki annað - ein daglig útspilling av fólki, sum tey ikki eingang kenna. Bara fyri at fáa nøkur likes frá øðrum racistum á Facebook...

Bólkurin Samhugi við Palestina hevur verið og verður enn skýrdur fyri bæði eitt og annað - heiladeyðir nassarar, sum liva av landinum, sum ikki kenna søguna, og enntá eisini verða kallaðir druknir tápulingar o.s.f.

Nú havi eg lurta eftir teimum on/off gjøgnum skjótt 2 ár, og eg kann bara siga, at meira siðilig fólk skal man leita leingi eftir.

Høvdu tey, sum rakka hesi niður, bara havt ein brøkpart av tí vitan, sum hesin bólkurin hevur, so hevði staðið væl til her á landi. Fólkini í bólkinum eru sera skilagóð og flest øll vælútbúgvin. Fleiri av teimum hava ferðast í Palestina, og tað hevur verið stak áhugavert at hoyrt um teirra eygleiðingar. Millum annað greiddi ein frá, at palestinar við palestinskum nummarplátum ikki sleppa at koyra á vanligu vegunum. Og, at um tú sært eitt hús við einum vatntanka á takinum, so býr ein palestini har, tí ein palestini fær ikki lov at leggja vatn inni í húsini. Men tað sleppur ein ísraeli. Eisini var sera áhugavert at hoyra eina føroyska gentu siga frá, at hon longu áðrenn hon kom inn í Gaza, fekk at vita, at hon skuldi rokna við at verða gjølla kannað av ísraelum, tá hon kom út aftur. Og so var, hon varð kropskannað av ísraelum, áðrenn hon slapp heim aftur úr Ísrael.

Men alt hetta er sjálvandi ein saga, nú ísraelar hava sorlað alt sundur!

Eg eri errin av at kenna fólkini í bólkinum Samhugi við Palestina og veit, at nógv taka undir við teimum, men ikki tora at siga tað hart, tí tey ræðast fordømingina og útspillingina, sum meira ella minni dominerar alla staðni á netinum.

"Hamasfjepparir" er eitt hent yndisorð at brúka hjá teimum, sum ikki tola at hoyra ella síggja nakran átala stjørnina í Ísrael, tí tá sleppur man undan sjálvur at taka støðu, ella at koma við nøkrum svari. Ein "falliterklæring" í sjálvum sær; men sum ofta verður brúkt av teimum, sum blanda seg í so gott sum øll kjak á netinum.

Vit vóru á Vaglinum mikukvøldið, tá føroyingar fagnaðu føðingardegnum hjá Ísrael, men tað var rættiliga surrealistiskt at standa har, meðan vit vistu, at ísraelar samstundis vóru farnir inn við enn størri megi fyri at drepa alt, sum var fyri í Gaza.

Ringa samvitskan hongur enn sum eitt dapurt skíggj yvir alt Europa, tí hvussu kundi man lata eyguni aftur fyri Holocaust?

Men tað er so ikki nøkur umbering fyri at ein innflytari úr Brooklyn ella onkra aðra staðni í verðini bara kann flyta til Ísrael í dag, og sum eina sjálvfylgju bæði fær løn fyri tað og vápn í hond frá ísraelska statinum, tí hann kanska hevði ein langabba, sum varð dripin av týskarum undir seinna veraldarbardaga. Og at hesin innflytarin so eisini frítt kann velja, hvørji hús hann stjelur frá palestinum, væl vardur av ísraelska herinum, er púrasta burtur úr vón og viti. Og tað vita øll. Og tí fordømir allur heimurin tað, sum fer fram í Palestina í dag - men ikki føroyskir politikarar.

Og júst tí hevur ein bólkur sum "Samhugi fyri Palestina" so stóran týdning.